# Fyrsti skúladagur

**Tað var fyrsti skúladagur í orðsins rætta týdningi í Sandavági. Bæði næmingarar og lærarar vóru nýggj, og tað var skúlastjórin, sum tók ímóti, eisini**

SKÚLABYRJAN
*Orð og myndir: Edvard Joensen*

**Sandavági:** Saman við 700 øðrum føroyskum børnum fóru tey 19 børnini, sum mánadagin byrjaðu í Gamla Skúla í Sandavági, í skúla fyri fyrstu ferð. Og eisini lærararnir vóru nýggir. Í hvussu er onnur, sum ikki hevur verið lærari fyrr, meðan hin var komin aðrastaðni frá. Og skúlastjórin tók fyri fyrstu ferð sum stjóri í móti einum fyrsta flokki. So alt varð sum nýtt.

Tey eru øgiliga spent, tey smáu, sum hendan dagin møta upp í Sandavági. Her eru foreldur, eldri og yngri systkin. Ommur eru fleiri komnar, og onkur abbi gongur eisini so spentur við fototóli og tekur myndir.

Lærararnir gera klárt innanfyri. Ikki er skúlin stórur. Bara tríggjar stovur, og tær eru heldur ikki stórar. Satt at siga er tað ikki serliga rúmligt hjá teimum 19 børnunum, sum sita í norðastu stovuni í Gamla Skúla. Men ikki tí. Tað verða bara tveir flokkar í skúlanum, so alt í alt eru hølisviðurskiftini ikki so heilt út av lagi, tí til ber at býta eitt sindur sundur, heldur skúlastjórin, Hans Jørgensen.



*Tað er sera spennandi at byrja í skúlanum fyrsta dag. Ikki minst hjá foreldrunum, sum brúka nógvan film ein slíkan dag*

So fer hann út í dyrnar og býður vælkomin. Nú er tann álvarsstundin komin, tá farast skal í skúla fyri fyrstu ferð. Og tað er rímiliga ymiskt, sum tað verður gjørt.

Summi koma brestandi inn og vilja tryggja sær tað besta plássið beinanveg. Men tað gongur ikki, tí lærararnir hava sett skelti við navninum hjá hvørjum einstøkum á borðini, so tað er longu avgjørt, hvussu tey skulu sita. Dreingir og gentur hvørt um annað.

Men onkur er, sum ikki er so álviligur kortini, nú tað er álvara. Hevur hug at lippa eitt sindur, og heldur best vera, um Mamma er við.

Jú, sjálvandi ber tað væl til. Tað er ikki at siga. So tá tey flestu noyðast út aftur, eftir at hava tikið myndir og pjátrað fyri hesum smáu soleiðis, sum nú verður gjørt ein slíkan dag, verður kortini onkur, sum hevur gingið í fyrsta flokki fyri langari tíð síðan, sitandi eftir eina løtu, meðan tær báðar Miriam og Jonna royna síni kynstur at fáa børnini at taka við skúlanum sum einum natúrligum parti av gerandisdegnum frá nú av.

Og uttan fyri bíða tey, sum ikki eru við inni í sjálvari skúlastovuni. Standa í gongini ella eru farin runt í Gamla Skúla at hyggja og kanska minnast aftur á, tá tey sjálv gingu her.

– Jú, her havi eg eisini gingið, Tvær stovur vóru tá, minnist ein omma, sum komin er higar í dag. Eitt rúm var í endanum, har tey goymdu kol. Men har er helst wc í dag, eru vit samdum, tí hurð er har, og trappan upp á loftið er beint við síðuna av, so wc má vera aftan fyri hina hurðina.

Skúlastjórin er ikki við inni í tímanum. Hann greiðir okkum í gongini frá, at hetta skúlasamstarvið millum Miðvágs- og Sandavágs Kommunur er frá 1961, tá skúlin varð bygdur á Giljanesi. Áðrenn ta tíð vórðu skúlanir í Miðvági og Sandavági álitið. Teir eru gamlir. Tann í Miðvági frá 1830, og tann í Sandavági, sum vit standa í í dag, er frá 1896. Gamli Skúli í Miðvági verður tó ikki brúktur til skúla í dag, uttan til ymiskt frítíðarvirksemi í bygdini.

Men tað gingu bara nøkur ár, til ásannað varð, at skúlin á Giljanesi eisini gjørdist ov trongur, og flutt varð aftur í bygdirnar báðar. Í Miðvági kom so nýggjur skúli, har miðlingaflokkarnir fóru, meðan tey yngstu ganga í skúla í Sandavági.

– Her er gott at vera hjá teimum smáu børnunum, ásannar skúlastjórin. Lítil ferðsla og friðaligt. Og søguligt er tað eisini. Eitt nú hevur kenda skald okkara, barnaskaldið burturav, Hans Andrias Djurhuus, eisini verið lærari í hesum skúlanum.

Í dag ganga 268 børn í Miðvágs- Sandavágs Skúla. Tey eru úr Sandavági, Miðvági og Vatnsoyrum, sum hoyrir til Miðvágs Kommunu.

Lærararnir eru 26 í tali, og tað man vera rímiliga gott at vera lærari her, heldur Hans Jørgensen, skúlastjóri. Tí nógvir hava verið leingi, og ongantíð er nakar trupulleiki at fáa lærarar til skúlan.

Tá skúlagongdin byrjaði aftur, vóru fýra lærarar við skúlan, sum høvdu verið lærarar í 30 ár, og ein, sum hevði verið tað í 25 ár. Um ikki øll árini, sum onkur tó hevur verið, so tey flestu júst við Miðvágs- Sandavágs Skúla.



*Nýggi skúlastjórin við Miðvágs- Sandavágs Skúla hevði eisini sín fyrsta skúladag saman við fyrsta flokki í Gamla Skúla í Sandavági*



# Føroyakvøld á Glyvrum

**Skipað verður fyri Føroyakvøldið í kappróðrarneystinum á Glyvrum hóskvøldið klokkan 19.00**

FERÐAVINNA

Skipað verður í annaðkvøld fyri enn einum av teimum væl umtóktu Føroyakvøldunum í kappróðrarneystinum á Glyvrum. Kunningarstovurnar í Eysturoy standa fyri, og atgongumerki kunnu keypast á kunningarstovunum í Fuglafirði og í Saltangará.

Kvøldið verður skipað, sum tey vanliga plaga at verða. Farið verður til borðs, har borðreitt er við serligum, føroyskum mati.

Framsýningar verða við serligum klædnasniðum. Tað eru Snældan av Strondum og Tøting í Gøtu, sum standa fyri hesum partinum.

Mentanin er sum vera man eisini við. Upplestur verður, har greitt verður frá føroyska samfelagnum, søgu og mentan, eins og føroyskur dansur eisini er á skránni. Honum fer Dansifelagið á Látrinum av Eiði at standa fyri. Tey fara at sýna vanligan dans eins og dansispøl, og sjálvsagt sleppa gestirnir eisini upp í ringin, áðrenn endað verður, sigur Kunningarstovan í Saltangará, í tíðindaskrivi, sent er um dagarnar.

*ej*



# Sjúklingarnir fáa nú betri umstøður á Hotell Tórshavn

**– Men nú ein tíð er farin, mugu vit ásanna, at hetta húsið skuldi ikki verið leigað til sjúklingahotell, tí tað er í so ringum standi, sigur Leiðarin á Hotell Tórshavn í Keypmannahavn**

HOTEL TÓRSHAVN
*Áki Bertholdsen*

– Tað er onki at siga til, at tey, sum skulu vera á Hotell Tórshavn í longri tíð, eru ónøgd.
Ina Frisdahl, leiðari á sjúklingahotellinum Tórshavn skilir væl, at summir sjúklingar eru misnøgdir við umstøðurnar á sjúklingahotellinum Tórshavn í Keypmannahavn, tí hon ásannar, at rættiliga nógvir trupulleikar standast av, at húsið er í so ringum standi.

Men hon sigur, at sjúklingar og teirra avvarðandi mugu ikki sita eftir við eini fatan av, at leiðslan á hotellinum onki ger við við trupulleikarnar, tí onki kann vera meiri skeivt enn tað.

– Vit arbeiða alla tíðina fyri at bøta um trupulleikarnar.

Men samstundis sigur hon, at høvdu tey havt somu vitan um húsið, tá ið tey leigaðu tað, sum tey hava nú, hevði tað aldrin verðið leiga til sjúklingahotell, tí tað er í so ringum standi.

– Men alt hetta eru trupulleikar, sum eru komnir til sjóndar eftir at vit leigaðu húsið og sum vit ongan møguleika høvdu at kenna til, tá ið sáttmálin varð undirskrivaður.

Og av tí sama sigur hon eisini, at tað tekur langa tíð at koma trupulleikunum til lívs og tilsamans er talan um arbeiðið fyri millióna-upphæddir, og sum tosast skal um við tann, sum eigur alt húsið.

Smittuvandin við legionellabakteriuni, sum greitt er frá í aðrari grein, er bara tann seinasti í røðini av trupulleikum, sum tey hava at dragast við á hotellinum.

Serligt ljós varð varpað á viðurskiftini á Hotel Tórshavn eftir at tað herfyri kom fram, at eitt fólk á hotellinum varð blivið smittað við legionellabakteriu.

Og í gjár greiddu tveir sjúklingar frá, hvussu ónøgdir teir vóru við umstøðurnar, eitt nú var svampur í summum kømurum, skipanin, sum luftar út, virkar ikki, onki fríøki er rundanum og hotellið er mangan yvirfylt.



*–Vit eru fullgreið yvir trupulleikan og eru hørm um støðuna. Men trupulleikin er, at tað er sjálvur bygningurin, sum er í ringum standi. Men vit arbeiða alla tíðina fyri at bøta um støðuna, sigur Ina Frisdahl, leiðari á Hotell Tórshavn*

## Arbeiða alla tíðina

Ina Frisdahl ásannar, at trupulleikarnir eru stórir, men at tey alla tíðina arbeiða fyri at bøta um støðuna.

Hon sigur, at stórar ábøtur eru gjørdar á húsið, so tey kemur heilt óvart á tey, at trupulleikarnir eru so stórir, sum teir nú vísa seg at vera.

– Sjálvsagt er tað strævið hjá sjúklingunum og teirra avvarðandi, men tað er eisini strævið hjá okkum, sum arbeiða her, tí tað fer rættiliga nógv arbeiðsorka til at royna at loysa teir ymsu trupulleikarnar, men hetta eru trupulleikar, sum vit ikki eru harrar yvir.

– Trupulleikin við svampi tók seg upp fyri nøkrum mánaðum síðani, men eisini tá varð embætislæknin tilkallaður og hann hevur staðfest, at svampurin er púra vandaleysur fyri fólk, so hóast tað er keðiligt við svampi er elva teir ikki til vanda.

– Men vit hava gjørt fyribils ábøtur, har svampur er staðfestur, men í longdini verða tey rúmini isolerað av nýggjum.

Somuleiðis ásannar hon, at skipanin, sum luftar út, ikki virkar sum hon skal, men eisini tað brekið verður arbeitt við at bøta uppá.

## Vaksið næstan 50%

Leiðarin á hotellinum ásannar eisini, at tað er ein trupulleiki, at hotellið er yvirfylt til tíðir.

– Men har mugu vit hava í huga, at talið av sjúklingum, sum verða sendir úr Føroyum til Danmarkar til viðgerð, er munandi vaksið hesi seinastu tvey, trý árini.

– Fyrra hálvár í ár høvdu vit næstan 50% fleiri gistingar enn vit høvdu fyrra hálvár í fjør og tað er sjálvsagt, at tað leggur stórt trýst á hotellið.

Ina Frisdahl sigur, at fyrra hálvár í fjør høvdu tey 8.052 gistinginar á hotellinum, men fyrra hálvár í ár hava tað verið 11.828 gistingar.

– Hetta hevur ført við sær, at vit viðhvørt hava verið noydd at leiga fleiri kømur aðrastaðni í býnum, tí pláss er ikki fyri øllum.

Sosatt ásannar hon eisini, at tað gista fleiri ferðir so nógv fólk á hotellinum enn tey upp á nakran máta væntaðu, tá ið tey leigaðu húsið.

– Men hetta er heldur ikki ein spurningur, sum vit eru harrar yvir, tí tað kemst av, at alsamt fleiri sjuklingar verða sendir til Danmarkar til sjúkuviðgerð.

Hon eigur, at ein onnur orsøk til, at gongdin hevur verið soleiðis, er, at føroyskir sjúklingar hava so nógv avvarðandi við á hotellið.

– Í so máta hava føroyingar rættiliga góðar sømdir, tí tað vísir seg, at næstan 90% av øllum føroyskum sjúklingum hava avvarðandi við sær á hotellið.

Hinvegin eru tað bara 25% av sjúklingunum, sum koma úr Grønlandi til Danmarkar, sum hava avvarðandi við.

– Vit síggja javnan, at sjúklingar úr Føroyum hava alt húskið niður við sær og tað skapar trupulleikar, tí tað var heldur ikki ætlanin við hotellinum.

– Tað er serliga um summarið, at hetta er ein trupulleiki. Men tað er kanska onki at siga til, tí tað er sera bíligt at gista her, tey avvarðandi betala bara 200 og 300 krónur um dagin við øllum matinum.

– Tað rætta hevði sjálvsagt verið, at tey, sum eru her leingi, høvdu tvey kømur, eitt at sova í og eitt at vera í um dagin, men tað er ógjørligt, so leingi vit ikki hava meiri pláss enn vit hava til tær gistingar vit hava.

Men hetta er eisini ein trupulleiki, sum tey arbeiða við, og onkur tiltøk verða sett í verk í næstum.

– Hetta er fyrst og fremst eitt hotell fyri sjúklingar og tí fara vit at seta strangari reglar í verk fyri, hvussu nógv avarðandi teir kunnu hava við sær.

Hon sigur, í vanligum førum sleppa sjúklingar her eftir bert at hava ein avvarðandi við, men er talan um sjúk børn, kunnu tey sjálvsagt hava bæði foreldrini við.

Í serligum førum kunnu sjúklingar sjálvsagt hava fleiri avvarðandi við.

Vit mæla eisini frá, at avvarðandi børn ikki eru ov leingi á hotellinum, tí umstøðurnar hjá teimum eru ikki serliga góðar, men tey eru sjálvsagt vælkomin at ferðast í eina tíð.

Hvørji onnur stig verða tikin, er ikki greitt, men hetta er ein spurningur, sum nú verður tikin upp við Landsstýrið.

## Liggur væl fyri

Annars er Ina Frisdahl ikki samd í, at hotellið liggur illa fyri.

– Tað er 15 minuttir at ganga yvir á Ríkissjúkrahúsið. Fælledparken, sum er eitt stórt fríøki við fótbóltsvøllum, svimjihøll og øðrum ítrivum, er 10 minuttir frá til gongu. Tað eru fimm minuttir at ganga til bussar og 10 minuttir til jarnbreytarstøð.

– À hotellinum hava vit koyristólar til tey, sum ikki orka at ganga, og tey, sum eru so illa fyri, hava onkran avvarðandi, sum kann hjálpa teimum.

– Men vit hava eisini prutl til brekað til tey, sum eru her í longri tíð, og sum ikki fáa gingið.

Og í næstu framtíð verður eisini garðurin við sjálvt hotellið gjørdur, so fólk kunnu eisini vera har og børn kunnu spæla har.

– Men tað skal heldur ikki gloymast, at føroyingar raðfesta ógvuliga høgt, at hotellið liggur so mitt í býnum sum gjørligt og tí bleiv tað hetta húsið.

Hinvegin hava grønlendingar keypt eitt niðurlagt røktarheim. Tað liggur eitt sindur uttanfyri býin, men afturfyri fingu teir eitt hús, sum er sera væl hóskandi til brekað við stórum fríøki rundanum.

Tey, sum eru á Hotell Tórshavn fáa í næstu framtíð eisini møguleikar fyri ymsum ítrivi.

– Vit fara at gera eitt rúm við ymsum amboðum og ymsari útgerð, har fólk kunnu stytta sær stundir við ymsum handaligum ítrivi.

Hotellið hevur fingið eina gávu upp á 50.000 krónur frá einum fólki, og tær skulu nú brúkast til hetta endamálið.

Ein atfinning hevur verið, at hotellið ikki hevur ein buss, men tað hevur hotellið ikki havt ráð til enn.

– Vit kundu sjálvsagt havt keypt ein buss við teirri játtan vit hava, men fyribils vilja vit heldur brúka peningin til onnur endamál, sum vit halda eru meiri átrokandi, sigur Ina Frisdahl.

Eitt nú er betri matur og sjónvarp á kømrini raðfestur hægri enn bussurin í løtuni.

Annars sigur hon, at peningur er savnaður til ein buss til hotellið, men nær hann kemur, veit hon ikki. Fyribils hava tey fingið 150.000 krónur frá Føroya Sparikassa og einar 80.000 frá Verkamannafylkingini, sum varð tikin av og tann peningurin er settur á konto til bussin til bussin.

– Sostatt er onki meiri ósatt enn at vit onki gera við trupulleikan. Vit eru fullgreið yvir trupulleikan og eru hørm um støðuna. Men trupulleikin er, at tað er sjálvur bygningurin, sum er í ringum standi, og skal hann gerast í góðan stand, er krevur tað millióna-upphæddir, men Rom varð ikki bygdur eftir einum degi, sigur Ina Frisdahl.